# HEILSANIR




Hjartaliga tillukku við 90 ára degnum sum var 14. septembur. Takk fyri alt tú ert fyri okkum. Vónandi hevur tú ein góðan og gleðiligan dag, sum vit øll onnur høvdu.
**Bestu heilsan vit úti á Polli**



**Góða Birita, Heðin og Durita**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum, Birita og Heðin 6. sept., og Durita 16. sept. Jesus pápi verður hjá tykkum. Vit elska tykkum.
**Mamma og babba**



**Góða Kristina**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 17. sep. Tað var sooo stuttligt at ferðast saman við tær í Disneyland.
**Heilsan Bjørg**



**Góða Fitta Kristina**
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum 17. sep. Jesus pápi vælsigni framtíð tína.
**Ynskja omma, abbi, Sonja og Poul**



**Hey Anja**
Góða fitta stórasystir. Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum 14. sept. Takk fyri at tú ert so góð við meg.
**Heilsan Jógvan**



**Góða fitta Anna Elisabeth**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 17. sept. Jesus pápi verið hjá tær. Vit elska teg.
**Kærar heilsur omman og abbin í Skopun**



**EG VIL IKKI HAVA TAÐ...!!!**
...eingin tímir at koyra myndir av mær í blaðið tá eg havi føðingardag :-( Come on altso, eg fylli 27 ár sunnudagin, kunnu tit ikki finna onkrar, og so bara koyra tær í blaðið næstu viku!?
**Heilsan Dukkan;-)**



**Góða Ass-Omma**
1000 takk fyri nógv bomm og drekkamunnar og hjartaliga tillukku. Muss muss frá
**Lucas og mammu**



**Hey - síggi eg ikki gott út**
80 ár - nei, tað má blíva 2x40. Góða Assamostir. Hjartaliga tillukku tann 21. frá okkum.
**Við Trøllagil**



**Tillukku góða**
Hav ein góðan føðingardag í Fútalág 14.
**Heilsan vit sum koma**



**Hey Elisabeth**
Tað var ein góð tíð á Handilsskúlanum. Tíðin gongur skjótt. Longu ert tú 30 ár! Vit síggjast í Fútalág, miss Fútalág.
**Heilsan HH'ararnir**

**Góðu Heðin og Birita**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum sum var 7. sept. og til Duritu, sum fyllir 16. sept. Hjartaliga tillukku. Jesus pápi verið hjá tykkum.
**Kærar heilsanir frá ommu og abba í Kollafirði**








**Góða Kristina**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 17. sep. Ja tað var stuttligt í Frankaríki ha? helst í sandinum. Hopa tú fært ein góðan dag :) Vit elska teg.
**Mamma og babba**


Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur: ________________________________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ________________
Bústaður: ________________
Bygd/býur: ________________ Tlf.: ________

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<